*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 3 | Heystíð 2021 | pedagogfelag.fo



**Aftur á slóðina**

**Bluff og onki gjøgnumskygni**

**Havnin er eftirbátur**

**Brekkstein lovar bata**

FØROYA PEDAGOG FELAG

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent

Upplag
400 eintøk

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Harald Joensen
Skrivari
harald@pedagogfelag.fo



Annika Østerø
Nevndarlimur
annika@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo





**5** Aftur á slóðina

**6** Bluff og onki gjøgnumskygni

**16** Havnin er eftirbátur

**18** Styttri arbeiðsvika loysir nógv

**20** Pedagogfelagið vónar hægri játtan

**22** Brekkstein lovar bata



ODDAGREIN **Jógvan Philbrow, formaður, skrivar**

# Fokus á menniskju heldur enn pengar



Tað er nú, kommunalu fíggjaráætlanirnar og løgtingsfíggjarlógin verða smíðað, og vit sleppa at síggja, hvussu tað námsfrøðiliga virkisøkið verður virðismett.

Stríðið um pengarnar er hart, og ofta er vitanin um veruligu umstøðurnar á gólvinum sera lítil ella als ikki til staðar. Í Almannaverkinum og í Tórshavnar Kommunu hevur gongdin tey seinastu nógvu árini verið, at fleiri lið vera sett inn ímillum politiska myndugleikan, ið skal játta peningin, og tykkum, ið skulu útinna tað námsfrøðiliga arbeiðið.

Eitt sjónligt dømi um hetta var, tá sosialpedagogiska økið bleiv umskipað til Almannaverkið, og einstøku stovnarnar mistu sín leiðara.

Fyri okkum tykist tað, sum at sjálvt innihaldið í fleiri førum, bara verður umrøtt reint teoretiskt, tí fleiri staðni loyva gerandisumstøðurnar ikki veruligum pedagogikki. Í summar tóktist ein samgongutingmaður at vera heldur stoyttur, tí virksemið, ella tænastan, hjá Almannaverkinum var skert í feriutíð. Tað var komið óvart á hann, hóast hetta er eitt evni, sum vit hava roynt at víst á í fleiri ár. Hetta er bara eitt dømi um, hvussu undarlig støðan er – millum annað at viðurskifti, ið eru púra sjálvsøgd fyri okkum –

als ikki eru tað fyri myndugleikan, ið játtar pengarnar.

Blaðið her, setur sjóneykuna á normeringar á dagstovaøkinum, serliga í høvuðsstaðarkommununi, har økið týðiliga hevur trupulleikar at dragast við. Eisini í Tórshavnar Kommunu, landsins størstu kommunu, ger hetta sama fyribrigdið seg galdandi, at nýggj og eftir okkara tykki óneyðug lið verða sett inn ímillum tey, sum skulu útinna námsfrøðina og tey á ovastu rók.

Meðan stovnsleiðarar í teimum smærru kommununum sleppa at sita við á fundi saman við borgarstjóranum at viðgera fíggjarætlanina, eru tað í okkara størstu kommunu eini seks-sjey lið frá gólvinum og upp til borgarstjóran. Tað sigur seg sjálvt, at tað er torført at vera hoyrdur undir slíkum umstøðum.

Politikararnir hava fokus á skeivum stað. Børn og vaksin fólk hava støðugt fleiri trupulleikar. Hetta siga bæði stovnar, skúlar og ymisk fakfólk. Bíðilistar til psykiatri og útgreiningar er langur.

Seinastu nógvu árini hevur gongdin verið, at alsamt størri bygningar verða bygdir at hýsa okkara barnagørðum, skúlum og serstovnum. Tankin er helst, at størri eindin er, betri tænastu ber til at veita. Frá at dagstovnarnir fyrr vórðu bygdir til 40-50 børn, verða stovnarnir í dag bygdir til 100 børn ella meira. Gongdin í fólkaskúlanum hevur verði tann sama, alsamt størri skúlar og miðsavnan, og eisini á tí sosialpedagogiska økinum tykist hugurin vera stórur at leggja nógv virksemi saman.

Fíggjarliga man tað hava givið meining við stórst møguligum rakstrareindum, tí tá er lættari at snikka tryggar fíggingarleistir saman.

Spurningurin er tó, um hetta eisini er ein fyrimunur, sum frá líður. Tí ein avleiðing av størri eindum er, at einstaklingurin gerst ein minni partur í heildini, hann gerst minni sjónligur. Setningar sum til dømis at “taka støði í tí einstaka barninum ella fólkinum” gerast støðugt torførari at liva upp til, tá starvsfólk skulu renna skjótari og skjótari og fyrihalda seg til fleiri og fleiri fólk.

Vit í Føroya Pedagogfelag sakna eina viðgerð av spurninginum, um teir fyrimunirnir, ið upp á nógvar mátar opinlýst eru við at vera eitt lítið samfelag, ikki eisini eiga at gera seg galdandi, tá talan er um eitt gott barnalív og menniskjalív.

Sum frá líður fer ein nærverandi tilgongd hjá øllum teimum, ið arbeiða við menniskjum, at merkja størri lívsgóðsku og færri stórar og varandi trupulleikar, hetta innan fyri bæði barnamenning, skúla, sosialpedagogikk, eldrarøkt og heilsurøkt.

Leingi hava fíggjarligu atlitini at kalla einsamøll stýrt samfelagskjakinum, og minni rúm hevur verið fyri menniskjaligum og fakligum atlitum.

Føroya Pedagogfelag vil virka fyri, at vit veruliga fara at seta sjóneykuna á menniskjað, tí øll hava uppiborið eitt gott lív.



*Fakligi bólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum er bólkur undir Føroya Pedagogfelag, og hann hevur verið sera aktivur, síðan hann fór til verka í juni 2019. Hesar, sum allar eru námsfrøðingar, mynda bólkin, úr vinstru Ingerð Andreasen, Elin Norðberg Wenningsted Tausen, Jóna Guttesen og Edda Hjartvarsdóttir, forkvinna í bólkinum. Alma á Lava, sum eisini er í bólkanevndini, vantar á myndini*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Aftur á slóðina

**Nógv vatn er runnið í ánni, síðan teir fyrstu námsfrøðingarnir fóru til arbeiðis í Føroyum. Bólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum fer í januar at skipa fyri tiltaki, har undangongukvinnurnar fara at siga frá**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Í januar fer fakligi áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum at skipa fyri einum spennandi tiltaki, har evnið verður dagstovnanámsfrøðin, og hvussu hon hevur ment seg í Føroyum.

Tiltakið skuldi upprunaliga verða í hesum mánaðinum, men er útsett vegna koronu-smittuútbrotið.

Á tiltakinum fara pionerarnir – námsfrøðingar, sum hava verið við, síðan námsfrøði yvirhøvur bleiv eitt yrkisfak í Føroyum – at greiða frá fyrstu tíðini og gongdini til nú.

Tað er fakligi bólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum undir Føroya Pedagogfelag, sum skipar fyri tiltakinum. Hesin bólkurin hevur verið sera aktivur, síðan hann fór til verka í juni 2019.

Edda Hjartvarsdóttir er forkvinna í bólkinum.

– Vit vóna sjálvandi, at so nógvar sum gjørligt av teimum, ið hava verið við frá byrjan ella næstan tað, fara at koma. Vit byggja øll á herðarnar á teimum, sum gingu undan, og fyri okkum, sum arbeiða við dagstovnanámsfrøðini í dag, er tað bæði áhugavert og læruríkt at hoyra, hvat drívmegin hjá teimum fyrstu námsfrøðingunum var, hvussu sjálv námsfrøðin og alt rundan um var tá – hvussu fakið hevði tað – og hvussu alt er broytt. Millum annað frá, at alt var sjálvsognarstovnar, sum eisini stýrdu sær sjálvum, til í dag, har kommunurnar varða av øllum stovnunum, sigur hon.

Allir námsfrøðingar og námsfrøðilig hjálparfólk eru vælkomin til tiltakið, nærri kunning um tíð og stað fer at vera á Facebook-bólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum, har eitt uppslag verður gjørt til endamálið.

Til ber til at tekna seg sum lim í fakliga áhugabólkinum við at senda teldupost til dagstovnanamsfrodi@gmail.com. Limagjaldið er 100 krónur um árið.



# BLUFF OG ONKI GJØGNUMSKYGNI

**Tórshavnar Kommuna eigur at ganga undan á námsfrøðiliga økinum, tí hon er nógv tann størsta kommunan í landinum, men normeringin bara minkar, og starvsfólk flýggja. Støðan í Havn ger, at alt námsfrøðiøkið í Føroyum fær ringt orð á seg, hóast tað als ikki er so ringt allastaðni. Tað sigur Bergdís E. Gisladóttir, búskaparfrøðingur og mamma at barni í dagstovni**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Dagstovnaøkið í Tórshavnar Kommunu hevur leingi verið í brennideplinum og fyri hvøssum atfinningum frá fleiri síðum – frá foreldrum, frá starvsfólkum á øllum stigum og ikki minst frá Føroya Pedagogfelag.

Starvsfólk á gólvinum trívast ikki og rýma ella vilja ikki søkja starv á dagstovnum í kommununi. Og tað sama er galdandi fyri fleiri leiðarar.

Pedagogblaðið hevur eisini áður varpað ljós á trupulleikarnar. Til dømis fyri einum ári síðan, í Pedagogblaðnum heystið 2020, tá Maika Samuelsen, námsfrøðingur, greiddi frá, hví hon ikki orkaði at stríðast meira og hevði sagt upp starvið sum dagstovnsleiðari í Býlingshúsinum í Maritugøtu í Hoyvík.

Men sambært Bergdís E. Gisladóttir, búskaparfrøðingi, fær støðan ikki verið øðrvísið, tí játtanin til dagstovnaøkið í Tórshavnar Kommunu einfalt er ov lág, og tískil ber tað snøgt sagt ikki til at halda normeringina, sum kommunan sigur seg hava.

## Onki gjøgnumskygni

Síðan dóttur hennara fekk pláss á dagstovni í Havn í 2018, hevur Bergdís E. Gisladóttir tikið lut í kjakinum um umstøðurnar hjá barnafamiljum í landsins størstu kommunu, og hon hevur fylgt væl við, hvussu standurin er á dagstovnunum í kommununi generelt, og hvussu økið er og verður umsitið.



At seta seg inn í tann umsitingarliga partin er tó lættari sagt enn gjørt, vísir hon á.

– Eitt, sum eyðkennir Tórshavnar Kommunu, er, at har er absolutt onki gjøgnumskygni. Ongin kann veruliga fylgja við í, hvussu ógvuslig sparingin á barnaøkinum í roynd og veru er. Men tá landið ongar lógarfestar standardir hevur fyri normeringum, ber til hjá kommununi bara at sleingja okkurt út. Síðan koma tey við samanberingum við eitt nú danskar kommunur, men við mínum royndum á økinum í Danmark, veit eg, at tað er ongin møguleiki fyri, at tey her hava somu normering sum í Danmark, tí tú kanst ongantíð hava eina betri normering, enn tað tú betalir fyri – ikki uttan so, at nógv sjálvboðin fólk eru til arbeiðis, sigur Bergdís E. Gisladóttir.

– Í øllum hinum Norðurlondunum eru fastar reglur um foreldragjald, og tí kunnu tey ikki blanda allan kostnað saman, soleiðis sum Tórshavnar Kommuna ger. Tá tú krevur foreldrini eftir pengum, mást tú altíð kunna vátta, at kommunan eisini livir upp til dagstovnalógina og setir pengar av til sín part av kostnaðinum. Men í dag er onki gjøgnumskygni, tí allir stovnarnir í Tóshavnar Kommunu eru blandaðir saman í eindir, og harafturat ynskir kommunan ikki at upplýsa, um starvsfólkini, sum tey siga arbeiða á stovnunum, arbeiða við reingerð, matgerð ella námsfrøði, leggur hon afturat.

## Minni til børnini

Eru roknistykkini hjá Tórshavnar Kommunu ógjøgnumskygd, so hevur hon, um nakar, førleikar at síggja eitt sindur ígjøgnum gruggið. Hon er útbúgvin búskaparfrøðingur á Copenhagen Business School í Danmark og hevur arbeitt í trý ár við roknskapum hjá privatum dagstovnum og sjálvsognarstovnum í Danmark. Harumframt hevur hon hollan kunnleika til kommunala umsiting og dagstovnaøkið í Íslandi, haðani hon er ættað. Í dag eigur og rekur hon ráðgevingarfyritøkuna Víðsýni.

– Eftir at hava hugt kommunalu roknskapirnar í gjøgnum, kann eg staðfesta, at fíggjarliga orkan, sum verður sett av til børnini í Tórshavnar Kommunu, verður lutfalsliga minni ár fyri ár, tá lagt verður upp fyri barnatali, lønarlagi og øktum eftirlønarútreiðslum. Fíggjarleisturin hongur slet ikki saman. Tað hevur so neiliga ávirkan allastaðni í



*Bergdís E. Gisladóttir hevur trupulleikarnar á dagstovnaøkinum í Tórshavnar Kommunu tætt at sær, tí hon eigur sjálv eitt barnagarðsbarn. Her er hon saman við soninum Bjarka Nóel, sum er 10 ár og gongur í Skúlanum við Løgmannabreyt, og dóttrini Fríðu Guðrún, sum er fýra ár og gongur í barnagarðinum Miðstovninum í Havn*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

skipanini. Tá tú sparir so ógvusliga klárar tú ikki at halda upp á starvsfólkini – tey gerast sjúk og rýma.

– Alt hetta kann eg síggja bara við at greina hagtølini, sum Pedagogfelagið hevur fingið frá kommununi. Og trupulleikin verður enn størri, tá arbeiðsloysið í landinum er so lágt, tí tað merkir, at størri kapping er um starvsfólkini. Tú skalt altíð fara væl við tínum starvsfólkum, men tá arbeiðsloysið er lágt, so kanst tú í hvussu er ikki loyva tær at fara soleiðis við teimum, sum Tórshavnar Kommuna ger, tí tey rýma bara og finna sær okkurt betri starv, sigur Bergdís E. Gisladóttir.

## Tøl í andsøgn

Tølini vísa eisini týðuligar andsøgnir í tí, sum kommunan sigur seg gera, og hvat orka er tøk til tað.

– Tórshavnar Kommuna hevur til dømis upplýst, at tey brúka slakar 90.000 tímar um árið í stuðulstímum. Bara tað eigur at krevja einar 100 námsfrøðingar, men tað eru námsfrøðingar, sum tey als ikki hava. So hvat eru hetta fyri stuðulstímar, spyr Bergdís E. Gisladóttir.

Við støði í tølunum hjá Tórshavnar Kommunu sjálvari og í tølum frá Hagstovuni vísir hon við talvum og grafum eisini á, at námsfrøðin als ikki fylgir við stóra vøkstrinum í barnatalinum.

Tað sæst, at sjálvt um barnatalið í Tórshavnar Kommunu veksur, so



*– Grundin til, at foreldur eru máttleys í Føroyum, tá kommunan ikki livir upp til endamálið við dagstovnalógini, er vantandi gjøgnumskygni og vantandi rapporteringskrøv*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

verða námsfrøðingarnir lutfalsliga færri, tá størvini verða umroknað til ársverk – tað er fulltíðarstørv.

Barnatalið á dagstovnunum er sostatt vaksið við stívliga 13 prosentum síðan 2017 – úr 1.972 upp í 2.234 (sí talvu 1 og 3) – men talið á námsfrøðingum umroknað til fulltíðarstørv stendur í stað – 118 í 2017 og 119 í 2021.

## Starvsfólk rýma

Aftanfyri tølini goymir seg eisini ein stór útskifting av námsfrøðiligum starvsfólki, sjálvt um talið av ársverkum ikki broytist.

– Tað er eitt álvarsamt vandatekin, at starvsfólk soleiðis koma og fara allatíðina og við stuttum millumbilum. Tí tað ber boð um, at starvsfólkini ikki kunna standa inni fyri tí arbeiði, tey gera í gerandisdegnum, og tað hevur aftur við sær, at góðskan fellur ógvusliga. Tølini vísa týðuliga, at Tórshavnar Kommuna ikki klárar at halda upp á námsfrøðingarnar, sigur Bergdís E. Gisladóttir.

Vánalig normering og vantandi gjøgnumskygni er helst høvuðsorsøkin til, at námsfrøðingar ikki støðast á dagstovnunum í Tórshavnar Kommunu. Men Bergdís E. Gisladóttir heldur eisini, at sjálvur bygnaðurin er við til at styggja fólk burtur.

– Tey hava innført eindarleiðslu og eitt ekstremt hierarki. Men ein dagstovnur er ein sjálvstøðug eind, og tað er bert neyðugt at hava leiðslu fyri hvønn stovnin sær. Tað riggar fínt aðrastaðni, til dømis í Danmark og í Íslandi, og onnur

leiðsluløg omanfyri stovnsleiðaran eru óneyðug og spill av pengum, tá økið er so hart spert, umframt at fleiri leiðsluløg skapa størri frástøðu ímillum tey á gólvinum og tey, sum hava evstu ábyrgdina.

– Um ætlanin er at spara pengar, so sparið heldur hierakiið burtur. Ein kommunal demokratisk vald dagstovnarnevnd, sum tey til dømis hava lógarfest í Íslandi, er nógv bíligari í rakstri, tí hon kann umsitast av skrivstovufólki, sum eru væl bíligari enn ein herur av eindarleiðarum, sigur hon.

## Normeringsprát er bluff

Tað er trot á námsfrøðingum í Føroyum, og allastaðni hava tey meira enn trupult við at halda ásetingina í dagstovnalógini um, at í minsta lagi tveir triðingar av starvsfólkunum skulu vera útbúnir námsfrøðingar. í dag er tað heldur reglan, at lutfallið er øvugt, at tveir triðingar av starvsfólkunum eru námsfrøðilig hjálparfólk og ein triðingur námsfrøðingar – dømi eru um dagstovnar kring landið, sum hava havt enn færri námsfrøðingar.

Men um samanborið verður við atdráttarmegina, sum høvuðsstaðurin hevur á øllum øðrum fakøkjum, so átti tað eisini at verið gravgangur til øll námsfrøðingastørvini í kommununi. Orsøkirnar til, at tað ikki er so, eru fleiri, heldur Bergdís E. Gisladóttir, men teir kunnu tvinnast saman í ein høvuðstrupulleika: Alvorliga vánalig normering.

Ongin lógarfest normering er á dagstovnaøkinum. Tí eru heldur ongar fastar reglur fyri grundarlagnum undir normeringunum, sum kommunurnar sjálvar áseta. Og tí er ofta talan um tað reina bluff, tá Tórshavnar Kommuna kemur við sínum normeringstølum, heldur Bergdís E. Gisladóttir.

– Tórshavnar Kommuna roynir ikki at betra normeringina á dagstovnaøkinum við sínum fíggjarleisti. Tað er sera lætt at staðfestsa hjá øllum, tí teir flestu stovnarnir fara ár eftir ár út um sína játtan, sjálvt um bara ein triðingur av starvsfólkunum eru námsfrøðingar. Tað vil siga, at stovnarnir í veruleikanum sleppa bíligari, enn teir høvdu gjørt, um teir megnaðu at fylgja dagstovnalógini, tí hjálparfólk eru jú bíligari í rakstri enn námsfrøðingar. Men kortini klára teir ikki at halda játtanina, sigur Bergdís E. Gisladóttir.

## Brot á dagstovnalógina

Hon vísir á, at í hinum Norðurlondunum hava tey eisini reglur fyri, hvussu stórur partur av starvsfólkinum skal vera námsfrøðingar, og har verður tað tikið í fullum álvara, tá játtanirnar verða skrúvaðar saman. Í Danmark verður játtanin til námsfrøðingalønir til dømis roknað út per barn samsvarandi ásetingunum, sum eisini har siga, at í minsta lagi tveir triðingar av starvsfólkunum skulu vera námsfrøðingar.

Tí noyðast donsku kommunurnar at seta pengar av til námsfrøðingalønir fyri at halda lógina. Har er tað eisini reglan, at verða pengarnir ikki játtaðir við støði í námsfrøðingalønum, so er tað brot á dagstovnalógina, og soleiðis er tað eisini í Íslandi.

– Í Føroyum, í hvussu er í Tórshavnar Kommunu, samsvarar lønarjáttanin verri enn so við ásetingina um minst tveir triðingar námsfrøðingar. Tað sigur mær, at kommunan als ikki roknar við námsfrøðingalønum, tá hon leggur sína fíggjarætlan. Tí

## Talva 1




*Talið av starvsfólkum á dagstovnunum í Tórshavnar Kommunu – vøggustovur og barnagarðar, men ikki íroknað avloysarar, leiðarar og frítíðartilboð – hevur sveiggjað ímillum 150 og 162 seinastu árini, og roknað um til fulltíðarstørv er tað at kalla tað sama nú, sum tað var í 2017 – sjálvt um barnatalið í sama tíðarskeiði er vaksið við stívliga 13 prosentum*

*Talva: Bergdís E. Gisladóttir – vidsyni.fo*

## Talva 2




*Talvan vísir starvsfólkabýtið á dagstovnunum í Tórshavnar Kommunu, tá leiðarar ikki eru taldir við. Tað sæst, at námsfrøðingarnir lutfalsliga gerast støðugt færri enn hjálparfólkini. Tímaløntir avloysarar eru ikki tiknir við, men bert starvsfólk við 15 tíma arbeiðsviku ella hægri*

*Talva: Bergdís E. Gisladóttir – vidsyni.fo*

dugi eg heldur ikki at síggja annað, enn at játtanirnar í útgangspunktinum eru brot á grein 8, stk 4 í dagstovnalógini, har tað verður ásett, at í minsta lagi tveir triðingar av starvsfólkatímunum skulu vera námsfrøðingatímar og tískil í mesta lagi ein triðingur hjálparfólkatímar. Men onki eftirlit verður framt við hesum í Føroyum, sigur Bergdís E. Gisladóttir.

– Tórshavnar Kommuna hevur umleið 136 ársverk av útbúnum námsfrøðingum á barnamenningarøkinum til meira enn 3.000 børn, um vit telja frítíðarskúlarnar við. Hesi ársverkini skulu so líka eisini klára okkurt um 90.000 eykatímar til børn við serligum tørvi, og bara tann eyka uppgávan krevur meginpartin av øllum námsfrøðingunum, sum eru eftir í kommununi. Øll síggja, at

hetta kann ikki fáast at hanga saman, men hesi tølini koma altso frá kommununi sjálvari ígjøgnum alment innlit, sum eg og Føroya Pedagogfelag hava fingið, sigur hon.

## Fakliga støðið versnar

At sjálvásett normering hjá kommununi ikki samsvarar við tað, sum verður játtað til dagstovnaøkið, hevur ta syndarligu avleiðing fyri øll – ikki minst børnini – at fakliga støðið og harvið góðskan fellur, leggur Bergdís E. Gisladóttir dent á. Og tá støðan er so ring í størstu kommununi, sum átti at gingið undan og lagt eitt høgt støði, so smittar tað av upp á alt tað námsfrøðiliga fakið í landinum.

– Tað er sera óheppið, tí dagstovnaøkið verður í veruleikanum væl rikið í nógvum av landsins kommunum. Í Tórshavnar Kommunu haldi eg hinvegin, at dagstovnaøkið regulert er kollapsað, tí fakligheitin er dottin niður fyri, og ymiskar lappaloysnir eru settar í verk, sum bara gera ilt verri. Ongin í leiðsluni viðgongur, hvussu støðan veruliga er. Tað er keðiligt, tí tá dagstovnaøkið ikki riggar í størstu kommununi í landinum, so oyðileggur tað nógv fyri hinar kommunurnar og landinum sum heild. Í seinasta enda kann tað elva til, at uppaftur færri fara at fáa sær námsfrøðiliga útbúgving, tí ábyrgdarleysar sparingar hjá hesi einu kommununi við teimum flestu arbeiðsplássunum hevur sett alt økið í ringt ljós, sigur hon.

## Lógarásettar normeringar

Lógarásettar normeringar er vegurin fram, um ætlanin er at tryggja eitt forsvarligt námsfrøðiligt støði á dagstovnunum – og samstundis eitt støði, sum er nøkulunda tað sama í øllum landsins kommunum, heldur Bergdís E. Gisladóttir.

– Tá tú ongar standardir hevur fyri normeringum í landinum yvirhøvur, og fá ella ongi álítandi hagtøl heldur eru fyri barnaøkini í teimum ymisku kommununum, so er sera torført at peika á, hví starvsfólk velja dagstovnaøkið frá summastaðni og serliga í Tórshavnar Kommunu. Men tað er greitt, at støðan í Tórshavnar Kommunu er ein heilt onnur enn í flest øllum hinum kommununum. Til dømis vísa tølini mær, at flestu kommunurnar hava hægri lønarjáttan fyri hvørt barnið enn Tórshavnar Kommuna – nógvar væl hægri og onkur næstan tvífalt so høga, sigur Bergdís E. Gisladóttir.

## Ónd ringrás

Talan er um eina keðiliga ringrás, sum bara gerst verri, heldur hon

– Námsfrøðingar ynskja sjálvandi at arbeiða saman við øðrum námsfrøðingum á høgum fakligum stigi, men gongdin, sum nú er, ger bara, at færri og færri námsfrøðingar tíma at arbeiða á dagstovnunum í Tórshavnar Kommunu. Tí tá kommunan fyri tað mesta játtar hjálparfólkarlønir, so eru ikki ráð til, at ein stovnur kann hava fleiri námsfrøðingar og eitt arbeiðstrýst, sum fólk orka.

– Tá ongir standardir hafturat eru, so kann ein stór kommuna oyðileggja alt fyri tær komunurnar, sum veruliga royna at hava betri arbeiðsumstøður og fakligheit. Tí tað kemur nevniliga ongantíð ordiliga fram, at tað bara eru ávísar kommunur, sum spara ov nógv. Í staðin hoyra vit ofta generellu søguna um, at tað kann føra til strongd at arbeiða á einum

## Talva 3




*Barnatalið í Tórshavnar Kommunu veksur støðugt*

*Talva: Bergdís E. Gisladóttir – vidsyni.fo*

## Talva 4




*Tá námsfrøðingar rýma, veksur trýstið á teir námsfrøðingarnar, sum eftir eru. Í Tórshavnar Kommunu eru út ímóti 18 børn til hvønn námsfrøðing, um roknað verður við, at 95 prosent av teimum 0-6 ára gomlu børnunum eru á stovni í einum ári. Til samanberingar eru 13 børn til hvønn námsfrøðing í Reykjavík, og í Keypmannahavn eru bara 8-9 børn fyri hvønn námsfrøðing*

*Talva: Bergdís E. Gisladóttir – vidsyni.fo*

dagstovni. Veruleikin er tó, at onkrar kommunur seta nógv meira pengar av til økið enn Tórshavnar Kommuna, og tí eru dagstovnarnir í hesum kommununum góð og væl virkandi arbeiðspláss, sigur Bergdís E. Gisladóttir..

## Normering og rapportering

Reglubundnar normeringar, sum leggja eitt gott grundstøði – ein standard – og gjøgnumskygni, er tað, sum afturat einari sømiligari løn skal til, fyri at tryggja eitt væl virkandi dagstovnaøki í Føroyum,




*Soleiðis er starvsfólkastøðan á dagstovnunum í okkara grannalondum. Tølini eru miðaltøl fyri lutfallið ímillum starvsfólk og børn; 1:4 merkir til dømis, at tað er eitt starvsfólkk fyri hvørji fýra børn*

tað er eisini júst fráveran av hesum fyritreytunum, sum er orsøkin til ringa standin nú, leggur Bergdís E. Gisladóttir dent á.

Hon sær vantandi gjøgnumskygni og vantandi rapporteringskrøv sum eina høvuðsorsøk til, at foreldur kenna seg máttleys i Føroyum, tá kommunur ikki liva upp til endamálið við dagstovnalógini.

Bergdís E. Gisladóttir greiðir frá, at tað til dømis í Íslandi ber til at fara inn á heimasíðuna hjá kommunufelagnum har og síggja yvirlit yvir normering, kostnað, útbúgvingarstøði og barnatali í hvørjum einasta dagstovni í landinum tíma fyri tíma. Har stendur eisini, hvussu nógv børn stovnurin er góðkendur at hýsa út frá reglum um minsta fermetratal fyri hvørt barnið.

– Upplýsingarnar skulu javnt og samt rapporterast inn, men tá tær ikki eru tøkar, sum støðan er í Føroyum, so er sera ringt hjá okkum foreldrum at siga og gera nakað – tí vit vita ov lítið, og í Havn fáa vit heldur onki at vita, sjálvt um vit spyrja, sigur hon.

## Onki innlit

– Tá eg arbeiddi við dagstovnaroknskapum í Danmark, var tað vanligt, at eg var við til at leggja roknskapirnar fram og greina teir fyri foreldrunum. Her í Havn havi eg hinvegin mugað biðið um innlit í roknskapartøl hjá stovninum hjá dóttir míni, tí eg undrist á, at roknskapurin fyri stovnin ikki liggur alment frammi. Tað er strævið at fáa innlit, og eg fái nógv ógreið svør. Eg veit tó, at foreldur í kommununi hava fullan rætt til innlit í viðurskiftini, tí tey gjalda part av rakstrinum av stovnunum. Tí hava tey sjálvandi rætt til at fáa at vita, hvat kommunan brúkar pengarnar til, sigur hon.

Bergdís E. Gisladóttir hevur betri fyritreytir enn nógv onnur foreldur at stríðast fyri betri raðfestingum á dagstovnaøkinum, tí hon sum búskaparfrøðingur við hollum innliti í umsitingina av danska dagstovnaøkinum og eisini tí íslendska, hevur fakligar førleikar til sjálv at leita fram viðkomandi tøl og upplýsingar.

– Men samstundis er tað so syrgiligt at síggja, at nógv foreldur kenna seg noydd at gevast í teirra stríði fyri eitt nú betri normeringum, tí tey hava ongi tøl at vísa á. Alt bítur seg sjálvt í halan. Tíbetur fekk Føroya Pedagogfelag í seinastu samráðingunum ígjøgnum, at alt økið skal kannast, og tað haldi eg er orðiliga gott, sigur hon.

# Havnin er eftirbátur

Trýstið á námsfrøðingarnar er nógv størst í Tórshavnar Kommunu samanborið við høvuðsstaðirnar í Íslandi og í Danmark, vísir Bergdís E. Gisladóttir, búskaparfrøðingur á.

– Ein einføld orsøk er, at tá námsfrøðingar og hjálparfólk rýma, so økist trýstið á tey, ið eftir eru at varða av námsfrøðini, sigur hon.

Í Keypmannahavn eru tilsamans 3.600 námsfrøðingar og 3.500 hjálparfólk til næstan 32.000 børn. Tað merkir, at tað á dagstovnunum har eru tilsamans meira enn 7.100 ársverk til hesi børnini. Starvsfólkini hava annaðhvørt trý vøggustovubørn hvør ella 6,1 barnagarðsbarn. Hesi tølini eru sambært Danmarks Statistik (https://statistikbanken.dk/boern3).

– Í hinum Norðurlondunum merkir normering lutfallið ímillum fulltíðarstarvsfólk og børn, sum eru á stovni átta tímar um dagin. Í Føroyum verður hinvegin altíð tosað um tímar, og tað ger tað torført at samanbera normeringstølini landanna millum, sigur Bergdís E. Gisladóttir.

Ein einfaldur máti at umrokna til tímar – tó at mátin ikki er fullkomin – er sambært henni at seta hvørt fulltíðarstarvsfólk í Danmark til 37 tímar arbeiðsviku, sum er galdandi har, og býta tímarnar við talinum á børnum fyri hvørt starvsfólkið.

Í Keypmannahavn merkir tað, at tað eru stívliga 12 tímar til hvørt vøggustovubarnið um vikuna (37:3) og stívliga 6 tímar til hvørt barnagarðsbarn (37:6,1).

Til samanberingar hevði Tórshavnar Kommuna í januar í ár 119 námsfrøðingar og 199 hjálparfólk og meira enn 2.200 dagstovnabørn.

Rokna vit við, at okkurt um ein triðingur er í vøggustovualdri, so eru umleið 730 vøggustovubørn, og umleið 1.470 eru sostatt barnagarðbørn. Ganga vit út frá, at eitt vøggustovubarn krevur tvær ferðir so nógva starvsfólkaorku sum eitt barnagarðsbarn, soleiðis sum gjørt verður í hinum Norðurlondunum, ber til at meta um normeringina í Tórshavnar Kommunu.

Eftir teimum tølunum er normeringin í Tórshavnar Kommunu eitt starvsfólk til 4,6 vøggustovubørn, sum svarar til átta tímar tímar fyri hvørt, og eitt starvsfólk til 9,2 barnagarðsbørn, sum svarar til fýra tímar fyri hvørt.

| | Normering (estimat) | | |
|---|---|---|---|
| | *Keypmannahavn* | *Tórshavn* | *munur* |
| Vøggustovubørn pr. Starvsfólk | 3 | 4,6 | 53,30% |
| Barnagarðsbørn pr. Starvsfólk | 6,1 | 9,2 | 50,80% |

*Avleiðing: Størri arbeiðsbyrða fyri starvsfólk*

| | *Keypmannahavn* | *Tórshavn* | *munur* |
|---|---|---|---|
| tímar pr. Vøggustovubarn | 12,3 | 8 | -34,80% |
| tímar pr. Barnagarðsbarn | 6,1 | 4 | -33,70% |

*Avleiðing: Minni barnamenning hjá børnum*

*Talvan vísir munin, sum at síggja til er á normeringunum í Keypmannahavn og í Tórshavnar Kommunu, og hvørjar avleiðingar munurin hevur á arbeiðsbyrðu og barnamenning*

*Talva: Bergdís E. Gisladóttir – vidsyni.fo*

Tímaløntir avloysarar eru ikki roknaðir við her.

– Samanberingin vísir, at normeringin í Keypmannahavn er munandi betri enn í Tórshavnar Kommunu, og tá er ikki lagt upp fyri, at tað í Tórshavnar Kommunu eisini eru 90.000 stuðulstímar, sum hesir somu námsfrøðingarnir skulu taka sær av, sigur Bergdís E. Gisladóttir.

Hon vísir á, at tað í hvussu er sær út til, at tað størsta arbeiðstrýstið á dagstovnaøkinum er í Tórshavnar Kommunu, men hon leggur samstundis dent á, at talan er um bruttotøl.

– Um eg skal kunna gera betri og neyvari samanberingar, má eg fáa betri tøl enn tey, sum kommunan higartil hevur latið mær.

– Men ein námsfrøðingur kann ikki vera fleiristaðni í senn, so sannlíkt er veruliga normeringin uppaftur verri, enn tað tykist við fyrsta eygnabrá. Tí hasir 90.000 stuðulstímarnir í sær sjálvum eiga at krevja okkurt um 100 námsfrøðingar. Úrslitið er helst, at fakligheitn fellur, bæði tá tað ræður um at taka sær av børnum við serligum tørvi, og tá tað snýr seg um vanliga gerandisdagin saman við børnum, sum ikki hava nakran serligan tørv, sigur Bergdís E. Gisladóttir.



*–Um eg skal kunna gera betri og neyvari samanberingar, má eg fáa betri tøl enn tey, sum kommunan higartil hevur latið mær. Men ein námsfrøðingur kann ikki vera fleiristaðni í senn, so sannlíkt er veruliga normeringin uppaftur verri, enn tað tykist við fyrsta eygnabrá, sigur Bergdís E. Gisladóttir, búskaparfrøðingur*

*Mynd:Ingolf S. Olsen*

# PEDAGOGFELAGIÐ VÓNAR HÆGRI JÁTTAN

**Eftir fyrstu viðgerð av fíggjarætlanini hjá Tórshavnar Kommunu hevði nevndin hjá Pedagogfelagnum ilt við at síggja samsvar við gyltu lyftini hjá nýggju býrássamgonguni og ítøkiligu raðfestinginarnar í fíggjarætlanaruppskotinum. Eftir ávíst samskifti við Annfinn Brekkstein hómar formaðurin tó glottar**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Nevndin í Pedagogfelagnum var vónbrotin, tá hon sá høvuðsyvirlitið fyri fíggjarætlanina hjá Tórshavnar Kommunu fyri 2022, ið bleiv alment, tá ætlanin var løgd fyri býráðið 30. september.

So vónbrotin, at nevndin 4. oktober legði eina grein út á heimasíðu felagsins við yvirskriftini "Børnini í Tórshavnar kommunu aftur gloymd".

Í greinini helt nevndin seg kunna staðfesta, at býráðið ongar visjónir hevði fyri dagstovnaøkið. Millum annað, tí rakstrarjáttanin til børn og ung bara veksur við 7,2 prosentum, sum ikki røkkur til meira enn at leggja upp fyri størri barnatali og lønarvøkstri.

Nevndin hefti seg eisini við, at lykilin at rokna normeringinarnar út eftir er óbroyttur frá 2021.

"Vit kunnu tí staðfesta, at landsins størsta kommuna ikki ætlar at bøta um korini hjá børnunum og sínum starvsfólkum", skrivaði nevndin á heimasíðuni 4. oktober.



*– Eg haldi, at fundurin flutti okkurt rætta vegin, so eg havi vónir um, at týðuligir batar fara at spyrjast burtur úr, tá uppskotið til fíggjarætlan skal til aðru viðgerð 25. november, sigur Jógvan Philbrow.*

## Betri vónir

Men síðan hevur Jógvan Philbrow, formaður í Pedagofelagnum, havt ein fund við Annfinn Brekkstein, formann í mentamálanevndini

| tkr | | Roknskapur 2020 | 2021 | 2022 | pst | kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 890.147 | 873.135 | 920.000 | 5,4% | *46.865* |
| 20601 | Felagsskattur | 55.298 | 28.000 | 35.000 | 25,0% | *7.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 602 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 155.841 | 154.817 | 154.817 | 0,0% | *0* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.675 | 33.844 | 36.072 | 6,6% | *2.228* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.138.562** | **1.091.796** | **1.147.889** | **5,1%** | ***56.093*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 93.422 | 95.895 | 99.138 | 3,4% | *3.243* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 256.186 | 282.668 | 302.171 | 6,9% | *19.503* |
| §3 | Børn og ung | 190.635 | 200.198 | 214.617 | 7,2% | *14.419* |
| §4 | Undirvísing | 42.880 | 45.008 | 47.159 | 4,8% | *2.151* |
| §5 | Mentan og frítíð | 61.694 | 65.573 | 63.830 | -2,7% | *-1.743* |
| §6 | Teknisk mál | 150.203 | 144.852 | 147.141 | 1,6% | *2.289* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 87.825 | 79.062 | 81.139 | 2,6% | *2.077* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -44.681 | -32.858 | -32.353 | -1,5% | *505* |
| | **Rakstur íalt** | **838.165** | **880.398** | **922.842** | **4,8%** | ***42.444*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.141 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 3.231 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | |
| | | | | 20.000 | 0,0% | |

*Eftir uppskotinum til fíggjarætlan skal rakstrarjáttanin til børn og ung bara økjast við 7,2 prosentum, sum ikki røkkur til meira enn vøksturin í barnatalinum og lønarvøksturin. Nú hevur Pedagogfelagið tó vónir um, at hetta talið verður hækkað, tá uppskotið verður endaliga viðgjørt og samtykt*

hjá Tórshavnar býráð. Fundurin gav Jógvani Philbrow vónir um, at okkurt frægari kortini fór at spyrjast burtur úr viðgerðini av fíggjarætlanini, enn tað, sum tølini í uppskotinum bóru boð um.

– Eg haldi, at fundurin flutti okkurt rætta vegin, so eg havi vónir um, at týðuligir batar fara at spyrjast burtur úr, tá uppskotið til fíggjarætlan skal til aðru viðgerð 25. november, sigur Jógvan Philbrow.

At tølini kunnu broytast, var eisini eitt, sum Heðin Mortensen, borgarstjóri, legði dent á bæði undir framløguni av fíggjarætlanaruppskotinum 30. september og undir fyrstu viðgerðini 28. oktober.

Tað harmar tó Jógvan Philbrow, at hann ikki enn hevur fingið at sæð álitið frá arbeiðsbólkinum, sum hevur eftirmett alt dagstovnaøkið hjá Tórshavnar Kommunu.

– Eg gangi út frá, at tað álitið er ætlað at vera katalogið, sum mentamálanevndin og býráðið fara at stinga út í kortið eftir, og tí eri eg ógvuliga spentur at síggja, hvat stendur í tí. Eg fekk eisini lovað, at vit skuldu fáa tað beinanvegin, men enn er so onki komið, sigur Jógvan Philbrow.



*Nevndin í Føroya Pedagogfelag var vónbrotin, tá hon sá uppskotið til fíggjarætlan hjá Tórshavnar Kommunu. Úr vinstru eru tað Nikkil Heinesen, næstformaður, Gunnvá Akraberg Hansen, nevndarlimur, Jógvan Philbrow, formaður, Harald Joensen, skrivari, og Annika Østerø, nevndarlimur*

# Brekkstein lovar bata

**Formaðurin í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð sigur, at dagstovnaøkið fær meira pengar á teimum næstu fíggjarætlanunum. Býráðið hevur fingið álit frá arbeiðsbólki, sum hevur eftirmett dagstovnaøkið**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Bergdís E. Gisladóttir, búskaparfrøðingur, sum er samrødd aðrastaðni her á síðunum, sigur seg onga broyting hava sæð yvirhøvur, síðan nýggja býráðið tók við á nýggjárinum, tá tað ræður um batar á dagstovnaøkinum.

Men Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, vissar um, at hann stendur við tað, sum hann segði við Pedagogblaðið eftir býráðsvalið í fjør, tá tað var greitt, at hann skuldi verða nýggjur formaður í mentamálanevndini.

Við Pedagogblaðið veturin 2020 segði hann millum annað soleiðis:

"Vit fóru upp á val við lyftum um uppnormering av dagstovnaøkinum og eldraøkinum, og eg kann siga so mikið, at vit báðir flokkarnir, sum nú hava skipað ein meiriluta í Tórshavnar býráð, eru púra greið yvir, hvat vit fara at arbeiða við – og vit eru eisini samd um, at fyrsti prioritetur hjá mær sum formanni í mentamálanevndini er dagstovnaøkið."

## Meira pengar næsta ár

Annfinn Brekkstein segði eisini, at hann ætlaði at spenna seg út fyri at "(...) fáa økið skipað soleiðis, at tey úti á stovnunum merkja, at tað verða fleiri hendur og fleiri fólk – at tað verður meira orka á gólvinum, har sum á stendur, og at pedagogarnir fáa eina betri fyrireikingartíð".

Í greinini væntaði hann tó, at tað fóru at ganga eini tvey ár, áðrenn nýggju tíðirnar av álvara fóru at merkjast á dagstovnunum. Í so máta hevur hann eitt ár afturat at gera ábøturnar í, men hann lovar tó, at uppraðfestingin eisini verður at síggja í fíggjarætlini fyri 2022. Hon skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hvat fíggjarætlanin ítøkiliga leggur upp til, fær Annfinn Brekkstein onki

sagt um enn, men at fleiri pengar verða settir av til dagstovnaøkið, sigur hann ongan iva vera um.

## Eftirmeting

Fyrr í ár varð ein arbeiðsbólkur settur at eftirmeta alt dagstovnaøkið, og hann hevur nýliga handað eitt álit, sum eisini hevur verið fyri á fundi í mentamálanevndini.

Annfinn Brekkstein sigur seg ikki fáa sagt meira um tað og handfaringina av málinum annars, fyrr enn fíggjarætlanin fyri næsta ár er endaliga samtykt.

Biðið er um innlit í hetta álit vegna Pedagogblaðið.

Eftirmetingarbólkurin er mannaður við umboðum fyri bæði pedagogar, hjálparfólk og stovnsleiðarar á dagstovnaøkinum í Tórshavnar Kommunu, Jóan Peturi Hentze, trivnaðarstjóra, Beintu Dalbø, deildarleiðara í Barna- og ungdómsdeildini, og Maiku Samuelsen, sum Annfinn Brekkstein sjálvur hevur valt í bólkin sum uttanhýsis fakfólk.

Maika Samuelsen er námsfrøðingur og fyrrverandi dagstovnsleiðari í Tórshavnar Kommunu. Í Pedagogblaðnum á heysti 2020 fanst hon eisini hvassliga at støðuni á dagstovnaøkinum í kommununi.

## Lyfti frá borgarstjóranum

Heðin Mortensen, borgarstjóri, nam eisini við dagstovnaøkið, tá uppskotið til fíggjarætlan varð lagt fram á býráðsfundinum 30. september. Sjálvt uppskotið er ikki alment, men borgarstjórin segði soleiðis um dagstovnaøkið:

"Á dagstovnaøkinum krevur vaksandi barnatalið, at fleiri pláss verða útvegað. Í samband við eftirmeting á dagstovnaøkinum kemur uppskot um øktar normeringar og fyrireikingartíð, og verður hetta tikið við í samband við viðgerðina av fíggjarætlanini. Normeringin til serstovur verður økt. Styrkt verður um námsfrøðiliga arbeiðið á stovnunum. Ein ætlan fyri førleikamenning skal tryggja nøktandi fakligt støði."

Í næsta Pedagogblaðnum fara vit at frætta nærri um nýggju játtanina til dagstovnaøkið í Tórshavnar Kommunu og ítøkiligu ætlanirnar hjá býráðssamgonguni á økinum.



*Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, vissar um, at hann ætlar at standa við lyftini um batar á dagstovnaøkinum*

Mynd: Ingolf S. Olsen

# Styttri arbeiðs-vika loysir nógv

**Fakfeløgini hava gjørt forarbeiðið, men stríðið at sannføra politisku skipanina um tað skilagóða í at stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar heldur fram, vissar formaðurin í Pedagogfelagnum um**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

5. oktober bleiv kanningin av fyrimunum og vansum við at stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar løgd fram í Smæruni í Havn. Tað eru Jan Otto S. Holm, búskapar- og fíggjarfrøðingur, og Regin Berg, stjórnmálafrøðingur, sum hava gjørt kanningina.

Hon vísir, at tað als ikki verður so dýrt at stytta arbeiðsvikuna, sum summi høvdu spátt. Nú skal kanningin so brúkast, og Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, vissar eisini um, at hon ikki bara verður tikin til eftirtektar og síðan løgd í eina skuffu

– Vit hava syrgt fyri, at eitt stórt og gott forarbeiði er gjørt. Í hvussu er teir stóru andstøðuflokkarnir hava eisini verið alment úti og sagt, at teir taka undir við at stytta arbeiðsvikuna. Vit fara áhaldandi at ganga á politisku skipanina at fáa tey øll, ella í hvussu er ein meiriluta, at síggja, at tað einasta rætta at gera er við lóg at stytta arbeiðsvikuna niður í 37 tímar, sigur hann.

Tað vóru Føroya Pedagogfelag, Akademikarafelag Føroya, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroya Lærarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Starvsfelagið, Heilsuhjálparafelag Føroya og Heilsurøktarafelagið, sum høvdu bílagt kanningina.

## Nógvir fyrimunir

Kanningin vísir eina rúgvu av fyrimunum við at stytta arbeiðsvikuna, meðan tað er ilt at fáa eyga á nakrar vansar yvirhøvur.

Jógvan Philbrow leggur dent á, at umframt teir eyðsæddu fyrimunirnar sum til dømis minni strongd og meira tíð saman við familjuni eru eisini nógvir aðrir ítøkiligir fyrimunir við styttri arbeiðsviku, tá tað um tað námsfrøðiliga fakið ræður.

– Ógvuliga nógvir av okkara limum arbeiða niðursetta tíð, summi tí tey ynskja tað, men nógv tí tey sleppa ikki annað. Vaktartalvur skulu ganga upp, so nóg mikið av arbeiðsfólki altíð er til arbeiðis, og tí verða ársverkini pettað sundur í parttíðarstørv. Við eini styttri



*Nógv fólk, bæði fakfelagsfólk, umboð fyri arbeiðsgevarar og politikarar, vóru til framløguna av kanningini av fyrimunum og vansum við stytting av arbeiðsvikuni. Framløgan var 5. oktober í Smæruni í Havn, og her er tað Jan Otto S. Holm, búskapar- og fíggjarfrøðingur, sum leggur fram*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

arbeiðsviku kunnu millum annað nógvir av hesum trupulleikunum loysast og brotnu brøkarnir gerast heilir, sigur hann.

## Nógv bíligari

Bíðað var í spenningi, eftir nýggju kanningini, tí tað vóru ikki hissini tøl fyri kostnaðin, sum frammanundan vóru á lofti. Í september í fjør skrivaði Helgi Abrahamsen, táverandi landsstýrismaður í vinnu- og umhvørvismálum, til dømis á sínum Facebook-vanga, at tað fór at kosta umleið 750 milliónir krónur at stytta arbeiðsvikuna úr 40 tímum niður í 37 tímar.

Kanningin hjá Jan Otto S. Holm og Regini Berg vísir hinvegin, at kostnaðurin ikki verður nær námind so stórur.

Henda kanningin umfatar bara tann almenna arbeiðsmarknaðin, og alt eftir, hvussu stramt tølini verða tulkað, er nettokostnaðurin fyri tann partin onkustaðni ímillum 80 og 105 milliónir krónur. Almenni arbeiðsmarknaðurin er umleið ein triðingur av øllum arbeiðsmarknaðinum, og verða kanningarúrslitini førd beinleiðis yvir á tann privata arbeiðsmarknaðin eisini, so er samlaði nettokostnaðurin fyri allan arbeiðsmarknaðin í mesta lagi umeið 300 milliónir krónur.

Tá kanningin varð løgd fram, bleiv tó sagt, at ymiskar multiplikatoreffektir ikki eru roknaðar við, og tað tí er rættiliga sannlíkt, at kostnaðurin verður enn minni.

Øll kanningin kann lesast á heimasíðuni hjá Føroya Pedagogfelag, www.pedagogfelag.fo



# Eftirløn

Til eitt langt virkið lív, eftir at farið er av arbeiðsmarknaðinum, er gott við eini persónligari uppsparing.

**Lat okkum hjálpa tær at seta saman títt fíggjarliga trygdarnet.**

liv.fo